# Fiskivinnan ikki nóg høgt í metum

*Hví velja føroyingar uppvaksnir í einum fiskivinnusamfelag næstan burturav útbúgving uttanfyri fiskivinnuna, spyr Rógvi Reinert*




*Vitan* er vorðin alt meira týðandi táttur av samfelagsmenningini. Hvussu er so statt við fólki við akdemiskari vitan innan høvuðsvinnu okkara? Hvussu er vitanin býtt við atliti til økismenning. Sum kunnugt hevur fiskivinnan lutfalsliga størri týdning uttan fyri Havnina, samstundis sum høvuðsstaðir vanliga draga flestar akademikarar til sín. Ein skjótur fyrispurningur innan vinnuna vísir, at sera fáir persónar við akademiskari útbúgving hava leiðandi størv innan fiskivinnuna, tað veri seg sum stjórar ella í størvum, ið hava beinleiðis tilvísing til stjórnina:

Yvirlitið vísir, at *fólk við akademiskari vitan ikki mynda leiðslurnar innan fiskivinnuna*. Sera lítil partur av tí akademiska kunnleikanum, ið vit flyta inn til Føroyar, verður sostatt partur av produktiva vinnulívinum. Hetta er so mikið meira løgið, tá ið hugsað verður um, at teir akademikarar, sum *hava* leiðarastørv innan høvuðsvinnuna, hava stórar avbjóðingar og góðar menningarmøguleikar.

Ikki kann kastast einum søgufrøðingi, einum fyrisitingarfrøðingi ella einum cand. mag. í donskum fyri, at teir ikki velja leiðarastørv innan høvuðsvinnuna. Tey hava eina útbúgving og velja starv, ið miðar ímóti slíkum størvum. Og hvussu ber tað til, at sjálvt tey, sum velja fiskivinnurelevant fak, *heldur ikki* sýna fiskivinnuni áhuga! Hví finnast t.d. lívfrøðingar, cand. merc.'ar, búskaparfrøðingar og verkfrøðingar ikki í leiðandi størvum í fiskivinnuni í stórum tali?

Viðkomandi spurningurin er ikki hví føroyingar við akademiskari útbúgving ikki velja starv innan høvuðsvinnuna, men heldur: Hví velja føroyingar - uppvaksnir í einum fiskivinnusamfelag - næstan burturav útbúgving innan umsiting, heilsu- og undirvísingarverk, fíggingarvirksemi og lógfrøði heldur enn fiskivinnu?

E in av orsøkunum er, at høvuðsvinnan er ikki høgt í metum, hóast hon útvegar umleið 95% av okkara útflutningsinntøkum. Tað er als ikki 'kall' at arbeiða sum tímaløntur á fiskavirki ella alibrúki í dag, og hugtakið 'ófaklærd arbeiðsmegi' er fest á hesi verkafólk. Hóast ein, ið hevur starvast í hesi vinnu í 30 ár, er vorðin serfrøðingar og meira 'faklærd/ur' enn kanska nakar annar, ja so verður hugtakið ikki broytt kortini. Hetta viðførir sjálvandi, at sambandið millum vinnuna og tey, ið ikki starvast í vinnuni, viknar.

Hesi viðurskifti síggjast aftur í sambandi við val av miðnámsútbúgving ella lærugreinum. Besta dømið er Fiskivinnuskúlin í Vestmanna, ið hevur so lítla undirtøku sum fáur skúli í Føroyum. Annað dømi er lærugreinin 'fiskivinna' á HF- ella handilsskúla. Í fleiri førum er lærugreinin tikin av tímatalvuni, tí ongir næmingar velja hana. Fyrst í 80-unum tók eg HF prógv, og í flokkinum valdu 22 næmingar lærugreinina sálarfrøði, men bert 6-7 valdu fiskivinnu!

Veika støðan, ið fiskivinnan hevur í hugaheiminum hjá uppvaksandi ættarliðnum, førir ungdómin burtur frá fiskivinnuni. Leiðslurnar í vinnuni verða tískil myndaðar av fólki, ið hava drúgvar royndir innan vinnuna: Skiparar, ið virka sum reiðarar; høvuðsíleggjarar og stigtakarar innan alivinnuna, ið sjálvir mynda leiðsluna á teirra brúki; og innan flakavinnuna geva drúgvar arbeiðsroyndir, uppgávur á lægri leiðslustigi og lýdni móti arbeiðsgevaranum fólki møguleika at mynda leiðsluna, sjálvt um bókligi førleikin ikki er stórur.

Hinvegin má ásannast, at akademikarin hevur ikki havt samband við vinnulívið, og tað ið har rørist. Harafturat verður hansara vitan ikki beinleiðis eftirspurd, tí fólkið í vinnuni ikki hava havt sambandi við akdemiskt umhvørvi. Úrslitið verður, at hann ikki heldur seg framat, tá ið leiðarastørv verða tøk. Lættari er at halda seg til, tá ið landsstovnar, heilsu- ella umsitingarverk søkja eftir fólki við júst tí útbúgving, ið tann nýklakti hevur tilognað sær. Yrkisroyndirnar í hesum starvinum eggja neyvan til at søkja starv inna høvuðsvinnuna seinri — heldur tvørturímóti.

Hvat er til ráða at taka? Grundleggjandi er, at høvuðsvinnan verður meira virðismett. Hon má fáa størri pláss innan okkara undirvísingarverk, og størri dentur eigur at verða lagdur á hesa vinnu innan lestrarvegleiðing, so útbúgvingarmøguleikar innan hesa vinnu verða meira sjónligir — ikki bert møguleikar í Danmark, men eisini aðrastaðni.

Onnur týðandi fortreyt er, at vit fáa ein skipan, har starvsroyndir ávirka inntøkuna, so ein við størri royndum fær hægri løn enn ein við fáum royndum; hetta eigur at verða samantvinnað við eini starvsváttan (vinnubrævi), ið staðfestir arbeiðsroyndirnar hjá tí einstaka. Tá eru tey ikki longur 'ófaklærd'. Virðingin, bæði fyri teimum og vinnuni, verður harvið størri.

Triðja fyritreytin er, at fiski-/alivinnan og akademikarar vísa størri áhuga hvør fyri øðrum. Vinnan eigur at síggja, at høgt útbúgvð fólk er eitt tilfeingi, ið kann menna vinnuna, og tey lesandi mugu gerast greið yvir, at her *eru* stórar og spennandi avbjóðingar. Ein byrjan kundi verið, at lesandi útintu granskingar- ella ráðgevingaruppgávur fyri ali— og fiskivinnuna. Í hesum sambandi er samstarvið millum arbeiðsgeverafelagið og Meginfelag Føroyska Studenta dømi um eitt stig á røttu leiðini. Avgerðandi fyri lívførið hjá tiltakinum verður tó, at báðir partar miðvíst lívga um tað frá byrjanin.

Greinin er tikin úr blaðnum Hugin og Munin sum Granskingarverkætlanin fyri Økismenning gevur út.

**Leiðarastørv**

| | Størv í alt | Harav akademikarar | Akademikara-% |
|---|---|---|---|
| Reiðaravirksemi | 60 | 2 | 3,3 % |
| Fiskaframleiðsla | 40 | 3 | 7,5% |
| Alivinnan | 20 | 4 | 20,0% |

## Nýtt tól fyri hoyribrekað

Felagið fyri hoyribrekað hevur ognað sær eina transportabla telelykkju, sum vit ætla at leiga út.

Ein telelykkja er eitt sera hent hjálpartól til teirra, ið brúka hoyritól. Av røttum áttu allir almennir bygningar at havt teleslyngu, men sum er, eru tað einans nakrar av kirkjunum, samkomuhús og aðrir almennir bygningar, sum t.d. Løgtingið, MBF-húsið, Læraraskúlahøllin og Norðurlandahúsið, ið eru útgjørdir við teleslyngu. Uttanfyri Havnina er uppaftur verri statt. Tað hevur verið ein saknur fyri felagið, at ikki bar til at halda fund, har vit vildu, tí telelykkja ikki var.

Vit hava tískil keypt eina telelykkju, sum vit kunnu hava við okkum. Og til tess, at eisini onnur kunnu fáa gleði av henni, hava vit gjørt av at leiga telelykkjuna út. Tey, ið hava áhugað fyri telelykkjuni, kunnu venda sær til MBF. Vit koma at krevja eitt depositum uppá 500 kr., og síðan 100 kr. um dagin í leigu, og tann, ið fær tólið útflýggjað, heftir við síni undirskrift fyri, at vit fáa tólið aftur óskalað.

Leygardagin 14. oktober heldur felagið limafund, har tosað verður um nýggja tøkni. Vit fara at tosa um hjálpartól til hoyribrekað í víðastu merking. Til at greiða frá á fundinum hava vit fingið Inu Weesberg frá Hoyrnardeildini á Sernámsdeplinum, Palla Mortensen frá Hjálpartólamiðstøðini, Føroya Tele fer at vísa okkurt av tí, teir selja. Eisini verður telelykkjan, sum felagið hevur útvegað sær, víst framm. Øll er væl komin á fundin og nýggir limir kunnu tekna seg.

### Hvat er ein telelykkja?

Ein telelykkja, ella teleslynga, sum hon eisini verður rópt — er eitt hjálpartól til hoyribrekað. Sum orðið sigur, er tað ein lykkja, sum er íbundin ein forsterkara. Hendan lykkja liggur runt í rúminum og uppfangar tey signal, sum koma úr teirri tráðleysu mikrofonini, sum talarin hevur. Signalið verður leitt gjøgnum lykkjuna runt rúmið og kemur síðan beinleiðis inn í hoyritólið hjá tí hoyribrekaða. Viðmerkjast skal, at tá skal hoyritólið verða sett á T. Tað merkir so, at ljóðið kemur beinleiðis frá tí, ið hevur orðið, og til hoyritólið, uttan at tað skal fara út í rúmið fyrst. Tí slepst undan ekkó, gangi o.s.fr. Vanliga verður telelykkja fest niðri við gólvið, men við hesari, sum flytast kann, verður leidningurin lagdur eftir gólvinum uttan um tey, ið lurta.



# Sterkari sól orsøk til alheims upphiting

*Granskarar eru komnir fram til, at strálingin frá sólini er økt munandi ta seinastu øldina. Hetta er høvuðsorsøkin til alheims upphitingina heldur enn økta nýtslan av fossilum brennievni*



*Sólarstrálurnar eru høvuðsorsøkin til alheimsupphitingina siga granskarar í eini nýggjari kanning, sum er gjørd*

Stefan í Skorini

Við hesum úrslitinum vísa granskararnir aftur, at upphitingin av jørðini kann steðgast við at leggja hægri avgjøld á brennievni.

Granskarar eru annars fyrr komnir fram til, at ovurnýtsla av fossilum brennievni hevur verið høvuðsorsøkin til alheims upphitingina, og tí hava fleiri politikarar arbeitt fyri at hækka avgjøldini á brennievni. Tískil eru brennievni vorðin dýrari hjá brúkarunum, og hetta er gjørt fyri at tálma nýtsluni.

### Økt stráling

Orsøkin til, at tað er vorðið heitari á jørðini seinnu árini, er tó heldur økt stráling frá sólini. Tískil verður meira hiti sendur av sólini á jørðina enn áður. Hetta er orsøkin til vakstrarhúsárinið, verður sagt í eini frágreiðing, sum granskarar frá ESA (European Space Agency) hava gjørt.

Í granskingini eru upplýsingar frá fylgisveinum og aðrar stjørnufrøðiligar upplýsingar nýttar at prógva, at leikluturin hjá sólini hevur verið undirmettur í øðrum granskingarúrslitum viðvíkjandi vakstrarhúsárininum, sum eru komin fram tey seinnu árini.

Nýggju kanningarnar fara at hava stóra politiska ávirkan. Politikarar hava í fleiri ár tikið við ráðum frá granskarum, sum hava sagt, at fyri at minka um vakstrarhúsárinið er neyðugt at hækka avgjøldini á brennievnum og hækka vegskattin. Á tann hátt verður útsendingin av koldioxidi minkað. Granskarar hava mett, at ækta mongdin av koldioxidi í luftini er størsta orsøkin til vakstrarhúsárinið.

Seinastu øldina er hitalagið á jørðini økt við 0,6 hitastigum. Granskarar spáa, at henda økingin verður 2 hitastig um hundrað ár. Økti hitin hevur havt við sær, at ein stórur partur av ísinum við báðar pólarnar er smeltaður, og vetrarnir um okkara leiðir eru heldur heitari.

### Fleiri faktorar

Granskingarúrslitini benda á, at upphitingin stavar frá, at mongdin av orku, sum verður send út av sólini, er vaksin munandi. Tað sama er galdandi fyri mongdina av ultraviolettum ljósi. Hetta er hent, samstundis sum at magnetøkið hjá sólini er tvífaldað. Magnetøkið er við til at forða einum stórum parti av teimum kosmisku strálunum, sum eru við til at skapa skýggj, at koma at jørðini. Við tað at færri skýggj eru, sleppa sólarstrálurnar lættari at jarðarflatuni.

Ein stórur partur av upplýsingunum er fingnar frá Soho fylgisveininum, sum skrásetir virksemi á sólini.

Ein av leiðarunum av verkætlanini, sum eitur Paal Brekke, sigur, at tað at leggja hægri avgjøld á brennievni kann verða gott á onkrum økjum, men at tað ikki fer at hjálpa nakað serligt í stríðnum at halda jørðina so kalda, sum hon er nú.

Vakstrarhúsárinið kemst av, at lufthválvið kring jørðina virkar sum glasið í einum vakstrarhúsi, har sólstrálurnar sleppa inn, men hitin verður fangaður inni í húsinum.

Hildið hevur verið, at orsøkin til hetta er, at mongdin av koldioxidi í luftini er økt við 30 prosentum tey seinastu árini. Koldioxidið stavar frá bilum, orkuverkum og øðrum motorriknum akførum.

Leikluturin hjá sólini var ikki tikin so álvarsliga í hesum sambandi. Granskarar hava fyrr hildið, at samlaða orkan frá sólini bara er økt 0,7 prosent seinastu 150 árini, og at bara ein tíggjundapartur av upphitingini stavar frá sólini.

At ultravioletta ljósið er økt 3 prosent er ikki tikið við í kanningarúrslit áður, og tað hevur við sær, at meira hiti verður fangaður á jørðini.

Niðurstøðan hjá granskarunum er tann, at sólin er høvuðsorsøkin til upphitingina, sum vit uppliva í løtuni, og at ísurin við pólarnar bráðnar. Tað er ikki økta koldioxidi í luftini, sum fyrr hildið. Enn er ikki greitt hvørjar avleiðingar hetta úrslitið fær, ella um tað verður tikið við í metingarnar hjá politikarum.

## Elst og yngst saman

***Tórshavn:** Sosiala nevnd í Tórshavnar býráði hevur biðið byggideildina um gera eina ætlan um, hvussu ein vøggustova og eitt eldrasambýli kunnu gerast á sama staði*

Stefan í Skorini

Vallalíð er staðið, har eldrasambýlið og vøggustovan eftir ætlan skulu gerast. Enn er einki samtykt av býráðnum, men sosiala nevnd hevur arbeitt við málinum og biðið um pening til projektering. Um byggideildin kemur við einum góðum uppskoti, verður uppskotið væntandi samtykt í býráðnum.

Elin Lindenskov, formaður í sosialu nevnd, sigur, at ætlanin er, at bæði eldrasambýlið og vøggustovan skulu fáa gleði av hvørjum øðrum, og tí tekur nevndin stig til at byggja báðar stovnarnar síð um síð.

Tað er vøggustovan hjá nonnunum, Stella Maris í Varðagøtu, sum skal flyta í nýggj høli. Arbeiðseftirlitið hevur verið á vitjan og kom til ta niðurstøðu, at hølini vóru ikki nóg væl egnað til vøggustovu, og tí verður væntandi flutt í nýggj høli. Í nýggja bygninginum skal pláss vera fyri fleiri børnum enn nú, men enn er ikki greitt, hvussu nógv børn kunnu fáa pláss. Tað verður greitt seinni, tí ætlanirnar eru langt frá lidnar enn.

Sankta Frans skúli hevur tørv á einum frítíðarskúla, og hann skal vera í hølunum hjá vøggustovuni í framtíðini, um uppskotið verður samtykt.

Eldrasambýlið er tað fyrsta av sínum slag, og býráðið hevur ætlanir um at gera fleiri.